# Alt ov fáir áhoyrarar



*Bert umleið 40 fólk hava verið til hvørja sýning av leikinum »Brim og brúdleyp«, men tey hava sanniliga hugnað sær. Aftaná seinastu sýning vórðu leikararnir kallaðir fram aftur tríggjar ferðir* (Mynd: Sjónleikarahúsið)

*Hugurin at fara til sjónleik í høvuðsstaðnum er so lítil í løtuni, at vandi er fyri at tað bert verða tríggjar sýningar afturat*

Sveinur Tróndarson

Um tað er tí at tað eru ov nógv tiltøk í høvuðsstaðnum í løtuni er ikki greitt, men tað hava verið ógvuliga fáir áhoyrarar til leikin »Brim og brúdleyp«.

Jákup Olsen sigur, at tað bert hava verið millum 30 og 40 fólk til hvørja sýning. Tá er frumsýningin undantikin.

– Men sum mítt eyga sær tað, so hava tey hugna sær sera væl. Tá leikurin er liðugur verða leikararnir kallaðir fram aftur á pallin ferð eftir ferð. Til seinastu sýning vórðu teir kallaðir fram aftur tríggjar ferðir.

**Pensjonistar hálvan prís**

Fyri at økja um áhugan fyri leikinum fer Sjónleikarahúsið at geva pensjonistum avsláttur í prísinum.

– Til sýningarnar sum verða framyvir sleppa pensjonistarnir fyri hálvan prís, sigur Jákup Olsen og hann leggur afturat, at hann vónar at fleiri fólk fara at koma til sjónleikin.

– Brim og brúdleyp er ein sjónleikur av tí góða gamla slagnum. Ein rættiligur skemtileikur. Leikararnir er óførir og nú eru barnasjúkurnar farnar aftur um, sigur Jákup.

**– Sera skemtiligur leikur**

Sosialurin hevur tosað við ein áhoyrara, sum var til leikin seinasta vikuskifti.

Hesin áhoyrarin sigur, at leikurin var sera væl framførdur og sera skemtiligur.

– Serliga spældi Birita Krossteig framúr væl. Hon hevur ein torføran leiklut við nógvum replikkum og hon tosaði alla tíðina. Men hon dugdi heilt ótrúliga væl.

– Hon er dominerandi í familjuni og hon undirtrykkir mannin væl og virðiliga, sigur hesin áhoyrarin sum heldur, at tað er spell at ikki fleiri fólk hava sæð leikin.

**Nakrar sýningar afturat**

Hvussu ofta leikurin verður framførdur afturat er Jákup Olsen, leikstjóri ikki greiður yvir í verandi løtu.

– Tað verða undir øllum umstøðum tríggjar sýningar afturat. Síðan mugu vit síggja um áhugin er batnaður.

Hann dylir ikki fyri, at hann er skuffaður av at ikki fleiri vilja síggja leikin, tí í gomlum søgum tá slíkir leikir vóru á palli, vóru leikhúsini fylt til síðsta sess í fleiri vikur.



# Grønlendingar keypt Suðurvarða

*Trolarin Suðurvarði er ikki longur á føroyskum hondum. Royal Greenland hevur keypt skipið frá Viberg Sørensen á Tvøroyri. – Tað slapst ikki av við vøruna, so tað sigur seg sjálvt, at skipið ikki kann bera seg*

Sveinur Tróndarson

Fyri stuttum stóð at lesa í Sosialinum, at Viberg Sørensen á Tvøroyri var noyddur at gevast við sínum royndum við at roykja svartkalva og at hann var noyddur at selja Suðurvarða.

Hesi orð eru nú vorðin veruleiki. Suðurvarði er ikki longur á føroyskum hondum, men er seldur til Grønlands.

Í tíðindaskrivi frá mekl-arafyritøkuni Maretec stendur at lesa, at fyritøkan hevur selt Suðurvarða fyri Viberg Sørensen til Royal Greenland í Nuuk.

Suðurvarði er góðar 40 metrar til longdar og er ein kombineraður frystitrolari, línu- og garnaskip. Hann varð bygdur í Noregi í 1976 og var totalrenoveraður á smiðjuni hjá Viberg Sørensen á Drelnesi í 1992-93.

Áðrenn Suðurvarði fer til Grønlands skal frystiorkan útbyggjast og tað arbeiði verður gjørt á Skála. Meðan hann liggur har inni verður hann eisini málaður.

Ætlanin hjá Grønlendingum við skipinum er, at tað ein part av árinum skal verða móðurskip og taka ímóti og viðgera svartkalva frá smábátum í Upernavik.

Eingir upplýsingar eru um søluprís í tíðindaskrivinum. Viberg Sørensen vil heldur ikki upplýsa nakað, men hann vil tó siga so mikið, at verður prísurin tikin í mun til ta orku sum er løgd í fyri at fáa alt at ganga, so er prísurin alt ov lágur.

Spurdur um hann ætlar at útvega sær nýtt skip sigur Viberg, at tað veit hann einki um enn.

– Vit hava Annitu og vit hava nóg mikið at gera við henni, men tað er ov tíðliga at siga nakað um vit fara at útvega okkum nýtt skip.

# Tórshavn verður eitt lítið Nashville

*Upprunaliga skuldi countryfestivalurin verða í byrjanini av hesum mánaðinum, men verkfallið í Danmark kom í vegin. Og av somu orsøk er skráin munandi broytt frá upprunaligu ætlanini*

Sveinur Tróndarson

Við flogfarinum hjá Atlantsflog í dag koma allir teir útlendsku luttakararnir, sum skulu verða við á Country festivalinum 1998, sum verður í Ítróttarhøllini á Hálsi í kvøld.

Orsakað av verkfallinum í Danmark í byrjanini av maj mánað var eitt sindur ógreitt hvørjir luttakararnir fóru at verða, men nú er alt endaliga fallið upp á pláss.

Tað vísti seg ikki at bera til at fáa Billy Swan og Tomboola Band at koma til Føroya nú og tí noyddust fyrireikararnir at leitra aðrastaðni.

Tað eydnaðist at finna góðar varamenn fyri teir sum ikki kundu koma.

**Tamra kemur**

Av upprunaligu útlendsku gestunum er tað bara Tamra Rosannes, sum enn er á skránni.

Tamra Rosannes er fødd í Amerika, men hevur búð seinastu nógvu árini í Danmark. Hon hevur eina framúr góða rødd og hevur nógvar heilt kendar sangir á skránni.

**Big Guitars from Memphis**

Tað var ikki ætlanin, at Big Guitars skuldi verða við, men tá tað barst frá hjá onkrum øðrum, játtaðu teir at koma við.

Big Guitars from Memphis koma ikki frá Memphis, men úr Chicago. Teir eru kendir fyri at spæla allan møguliga tónleik og eisini eru teir kendir fyri at spæla sera lívliga tónleik.

Tað er guitarspælarin John Ivan, sum er oddamaður í bólkinum og tað er eisini hann, sum ger um seg á apallinum.

Big Guitars from Memphis spælir helvt um helvt sjálvgjørdan og kopieraðan tónleik, og av tí tónleikinum teir gera sjálvir er tað guitarspælarin John Ivan sum ger meginpartin.

Big Guitars from Memphis hava verið í Føroyum fyrr. Tað var í 1991, men tá vóru teir púra ókendir.

Á konsertini í kvøld, skulu Big Guitars spæla undir hjá eitt nú Tamru Rosannes og kanska onkrum øðrum við.

**McCoy munnharpusnillingur**

Tað var heldur ikki ætlanin at Charlie McCoy skuldi vera við, men eisini hann játtaði at koma hendavegin tá tað barst hinum frá.

McCoy var við á fyrsta festivalinum, sum var í 1996 og áhoyrararnir sum vóru við tá minnast enn tað framúr góða munnharpuspæla hann vísti.

McCoy er eingin unglingi longur. Hann er føddur í 1941, men tað sæst ikki á framførslu hansara.

Eisini hann er ættaður úr Amerika og hann hevur spælt saman við rættiliga »stórum« monnum ígjøgnum tíðina.

Nevnast kunnu nøvn sum Elvis Presley og eisini Jordannaires.

Tað sigst um framførsluna hjá McCoy, at hann hevur minst 20 munnharpur við á pallin - ella tað sær soleiðis út, tí tað er futtur í honum alla tíðina.

**Stórur áhugi fyri tiltakinum**

Tað sær út til at verða stórur áhugi fyri tiltakinum.

Páll Arge, sum fyrireikar festivalin sigur, at tað er komin rættilig ferð á atgongumerkjasøluna og at tað er nakað sum týðir uppá, at tað fer at verða fult hús í Ítróttarhøllini á Hálsi leygarkvøldið.

Tað er tó ikki fyrr enn teir seinastu dagarnar at telefonirnar eru farnar at gløða. Fyrst í vikuni høvdu ikki so nógv keypt atgongumerki, men hetta órógvar ikki fyrireikararnar.

– Hetta er eitt vanligt føroyskt fyribrigdi, sigur Páll Arge um at føroyingar altí keypa atgongumerkini í síðstu løtu.

**Hotel Føroyar í country hýri**

Men tað eru ikki bara fyrireikararnir av Country festivalinum sum eru í »country hýri«, tað eru tey eisini á Hotel Føroyum.

Í samband við festivalin hava tey nevniliga gjørt eina serliga matskrá til dagin.

Harafturat bjóðar hotelli avbygdafólki at gista hjá teimum fyri ein rímuligan penga ístaðin fyri at fara til húsa aftur í bili.

Tilboðið er sjálvandi eisini galdandi fyri fólk úr høvuðsstaðnum um tey vilja geva sær sjálvum eina góða nátt í samband við Country festivalin 1998.